

Fíggjarmálaráðharrin í Saudi-Arabia, Ibrahim al-Assaf, sigur at landið ikki kemur at minka um útreiðslurnar fyri tað um oljuprísurin er lágur. Mynd: EPA/KONSTANTIN SALOMATIN / POOL

# Saudi-Arabia fær risaundirskot á fíggjarlógini

**Jógvan Hugo Gardar**

25.12.2014 - 19:20

Oljan.fo

Fíggjarlógin hjá saudi-Arabia kemur at geva eitt hall uppá umleið 240 milliardir krónur í 2015, orsaka av lága oljuprísinum.

Hetta kom fram í eini tíðindasending á ríkiskringvarpinum hjá landinum í dag, sambært E24. Talan er um størsta undirskotið á fíggjarlógini nakrantíð. Útreiðslurnar hjá Saudi-Arabia vera um 860 milliardir riyal, svarandi til einar 1400 milliardir danskar krónur. Inntøkurnar eru mettar til einar 715 milliardir riyal, ella 1160 milliardir krónur.

Meir enn 90 prosent av inntøkunum hjá Saudi-Arabia koma frá oljuni, og við einum oljuprísi sum er minkaður við eini helvt, so sæst tað aftur í fíggongini av landinum. Fíggjarmálaráðharrin í Saudi-Arabia, Ibrahim al-Assaf, segði nýliga, at landið kemur at halda útreiðslustøði, sjálvt um oljuprísurin er lækkaður nógv.

Oljumálaráðharrin hjá Saudi-Arabia, Ali al-Naimi segði fyrr í vikuni at hvørki Saudi-Arabia ella hini OPEC-londini ætlað at minka um oljuframleiðsluna fyri at trýsta prísin upp. Hann segði at OPEC kann liva við einum oljuprísi sum liggur heilt niðri á 20 dollarum. Í dag liggur prísurin um 60 dollarar fyri fatið. Hann legði afturat at um nakar ynskir hægri prís, so noyðast lond uttanfyri OPEC at minka um framleiðsluna